# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Líggjas Joensen 65 ár



Hósdagin 27. apríl fyllir Líggjas Joensen í Havn 65 ár. Líggjas hevur í mong ár verið vinnulívsmaður, og hann er fyrrverandi formaður í Ítróttarsambandi Føroya.

Líggjas er gøtumaður. Foreldrini hjá honum vóru Hanna fødd Gregersen og Leon Joensen. Mamman var úr Syðrugøtu, og pápin var ættaður úr Froðba. Hanna og Leon fingu fimm børn: Jórun Smith, sum býr á Argjum, Líggjas, Oddvá Nattestad, sum býr í Havn, Jógvan Salemon, sum býr í Syðrugøtu, og Helgi, sum býr í London.

Líggjas kom til Havnar í 1962, tá ið hann fór í læru í Føroya Banka. Meðan hann lærdi, koyrdi hann hýruvogn og rak SnarVask í Bøgøtu. Í 1964 flutti hann til niður til Danmarkar, har hann arbeiddi á skrivstovuni hjá General Motors í Keypmannahavn.

Í 1966 flutti Líggjas aftur til Havnar. Tá fór hann á skrivstovuna hjá Skipafelagnum Føroyar. Í 1971 fór hann at arbeiða á granskoðaravirkinum hjá Carl Wilhelm Weihe. Har var hann í tvey ár, og so var hann í tíggju ár roknskaparstjóri hjá Tórshavnar býráði. Í 1983 fór Líggjas at arbeiða hjá Føroya Fiskasølu. Har var hann inntil í 1994, tá ið hann saman við øðrum stovnaði Farpack. Líggjas hevur verið stjóri øll árini, og tað er hann framvegis. Upprunaliga var setningurin hjá Farpack at útvega pakkitilfar til fiskivinnuna. Seinni er arbeiðsøkið víðkað rættuliga nógv.

Líggjas hevur havt fleiri álitisstørv í vinnulívinum. Eitt nú er hann næstformaður í Oljuvinnufelagnum, sum er felag hjá teimum, ið hava áhuga í at vera við í oljuvinnuni eitt nú sum veitarar.

Líggjas er giftur Hergerð, f. Joensen og ættað úr Fuglafirði. Foreldur hennara vóru Herborg og Jóhan Joensen í Toftum í Fuglafirði. Hergerð og Líggjas búgva í hugnaligum heimi undir Heygnum, og tey eiga trý børn: Heðin, Joan og Herborg, sum øll búgva í høvuðsstaðnum. Líggjas er sera familjukærur, og hann gongur eisini høgt upp í abbabørnini. Higartil eru tey fýra í tali, og eitt er á veg.

Líggjas er ógvuliga ítróttaráhugaður. Hann hevur spælt badminton í mong ár. Mestu orkuna í frítíðini hevur hann nýtt til at skipa fyri og at leggja til rættis ítróttini at frama. Í 1970 gjørdist hann kassameistari í Havnar Badmintonfelag. Longu í desember 1971 varð hann valdur til formann í Ítróttarsambandi Føroya, og í tí sessinum sat Líggjas inntil í 1976. Í 1974 gjørdust Føroyar limur í altjóða hondbóltssamgonguni. Líggjas var saman við øðrum føroyingum hjástaddur í Jesolo í Italia. Hetta hevur hann altíð mett sum ein av tindunum í síni ítróttarligu karrieru, tí frammanundan var frá føroyskari síðu gjørt stórt fyrireikingararbeiði, soleiðis at hetta skuldi eydnast. Føroyar vórðu limir í altjóða hondbóltssamgonguni saman við eitt nú Saudi Arabia!

Eitt annað stig, sum varð tikið hesi árini, var at bøta um húsaumstøðurnar hjá umsitingini. ÍSF keypti húsini, sum Neistin átti í Gundadali. ÍSF, sum frammanundan hevði leigað tvey rúm í Sverrisgøtu, flutti inn í Gundadali í 1974, tá ið ÍSF fylti 35 ár. Teir bygdu um og víðkaðu um húsini, og ÍSF heldur framvegis til í Gundadali.

Í 1978 var Líggjas millum teirra, sum fóru undir arbeiðið at fáa C HM kappingina í hondbólti til Føroya. Tað eydnaðist, og kappingin var í Føroyum stutt eftir ársskiftið í 1980. Tá ið Hondbóltssamband Føroya varð stovnað í 1980 gjørdist Líggjas formaður. Hann sat í sessinum inntil í 1982. Síðani hevur hann ikki verið í nevndum, men hann hevur hjálpt til og stuðlað eitt nú, tá ið Oyggjaleikirnir vóru í Føroyum í 1989.

## Páll á Dul 90 ár



Páll hevur ofta tikið heldur skemtiliga til, at, "tá eg havi føðingardag, eru øll fløgg í Føroyum á fullari stong".

Páll á Dul varð føddur í Havn 25. apríl 1916. Foreldrini vóru Agnas og Jógvan Jensen. Hann vaks upp saman við átta øðrum systkjum.

Í 1933 kom Páll til Klaksvíkar at arbeiða á posthúsinum. Eitt ár seinni fór hann í starv hjá J. F. Kjølbro. Hevur helst verið har í góð tvey ár og fór síðani aftur til Havnar, har hann tók studentsprógv í 1939.

Leiðin lá síðani til Keypmannahavnar, fyri at fáa sær hægri útbúgving. Hann tók handilsskúlaprógv í 1939 og í 1948 leyk hann prógv í løgfrøði.

Í 1941 giftust hann og Alexandra (fødd Isaksen) dóttir Sáru og Jens Clæmint Isaksen. – Tey vórðu so í Danmark øll krígsárini.

Trý eru børnini. Sára, sum giftist við Sverra Hentze av Sandi, búgva í Danmark. Agnar er giftur við Evy (fødd Christensen) ættað úr Danmark búgva í Klaksvík. Marita, gift við Jón Nystrøm úr Klaksvík, og búsett í Danmark.

### Spennandi fyritøka

Um ta tíðina, Páll tók prógv í løgfrøði, var J. F. Kjølbro á veg móti vinnuliga tindinum, og felagið sum vaks til nógv størstu og víðfevndu fyritøkuna í Føroyum nakrantíð, gjørdist tí eitt av mest spennandi arbeiðsplássum í Norðurlondum. Hann kom í fyritøkuna í 1949 sum prokuristur, eftir at Poul Als, sum tá hevði verið stjóri í eini tíggju ár, fór aftur til Danmarkar. Páll var har til 1966. Soleiðs gjørdist hesin gávuríki havnarmaðurin klaksvíkingur.

Lat vera sagt, at Páll varð ein fongur fyri Klaksvík meir enn á ein hátt. Eg kundi tí hugsa mær at nomið við onkrar tættir av mongu virðunum, sum eyðkendu Páll.

### Góður vegleiðari

Hann hevði djúp árin á okkum sum børn, við hansara serstøku evnum sum sunnudagsskúlalærari. Hansara trúfesti, lætta lyndi og góðu frásagnarevni, settu seg føst í okkum. Hann var við til at geva okkum, sum tá vuksu upp, eina góða barlast fyri lívið.

Seinni kom eg í læru á skrivstovuni hjá Kjølbro, har Páll eitt nú var starvsfólkaleiða ri. Her vísti hann aftur arbeiðssemi, vildi hava mál avgreidd, var trúfastur, prinsipfastur og møtti upp til tíðina og tá nakað var áfatt.

### Tók lut

Í 1971 varð hann valdur í býráðið á uttanflokkalista, og varð valdur til borgarstjóra. Fyri okkum yngru sum tá vóru innvaldir, Kára Kjelnæs, Olvheðin Jacobsen og meg, vóru Páll, Trygvi Laksáfoss, Hans Andreas Jacobsen (Hansy) og Asbjørn Joensen góðir garvaðir lærumeistarar.

Páll var greiður og altíð hampuligur í orðaskiftum og hann greiddi málini væl við tí holla praktiska og teoretiska førningi, hann hevði við sær.

Umframt at sita í býráðnum, var hann stjóri á nýstovnaðu løngjalds-stovuni. – Í 1974 var hann valdur inn á Fólkaflokslistanum, men stillaði síðani ikki uppaftur valið eftir.

### Hevur verið sosialur

Í samkomuni í Betesda hevur Páll verið hollur verkamaður, bæði at bera orðið fram og sum tolkur bæði frá enskum og týskum.

Ja, og hvør minnist ikki eisini hansara mongu skemtiligu veitslutalur.

Heimið hjá Alexandru og Páll hevur altíð staðið opið fyri fremmandum, og tá trúboðarar so mangan vitjaðu í Betesda, stóð heimið hjá hesum fyrimyndarliga pari altíð opið.

Ein táttin afturat fari eg í stuttum at nema við, tað er ta vitjunartænastu hann í so mong ár trúliga ynti, har hann vitjaði gomul og veik, hevði eitt orð, ein sang og bøn við teimum og soleiðis gleddi tey. Her vóru brøðurnir Karl og Álvur Josephsen hjálpsamir við bilflutningi.

Góði Páll, her verður ikki pláss fyri meira í hesum umfari, men fari bert at ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum níti árunum, og at Harrin má signa teg og tíni, nú hesi seinnu árini hjá tær gjørdust so tunglig á røktarheiminum.

Eg fari tí persónliga takka tær fyri ta fyrimynd tú var fyri meg og okkum ungu sum vuksu upp, tey árini tú var yngri, frískur, lættur og ferðugur og ongantíð spardi teg.

**Jógvan við Keldu**

Heimdesign:

## Alt til køkin og húsarhaldið



*Jói Winther í handlinum Heimdesign í Dr. Jacobsensgøtu. Hann hevur eisini yvirtikið grannahandilin "Dulamenn", ið m.a. seldi dustsúgvarar og onnur el-húsarhaldstól*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**1. apríl 2006 yvirtók Jói Winther í Havn handilin Heimdesign í Dr. Jacobsensgøtu 15. Eisini hevur hann yvirtikið grannahandilin "Dulamenn", ið m.a. seldi dustsúgvarar og onnur el-húsarhaldstól. Í hesum sambandi byrjar útsølan leygardagin**

HANDIL

Handilin Heimdesign í Dr. Jacobsensgøtu er nú yvitikin av Jóa Winther í Havn.

Jói Winther sigur, at Heimdesign leggur serligan dent á sølu av køksútgerð og smáum húsarhaldstólum sum t.d. el-ketlum, kaffimaskinum, páleggsmaskinum, toastarum og breyðristarum, serliga av merkinum "Severin".

Eisini eru nógv ymisk sløg av koppastellum at fáa sum t.d. Rosendahl, Zone, Aida og Eva-Trio.

Innan dustsúgvarar er tað serliga Miéle, sum er høvuðsmerkið. Annars eru posar til flest allar dustsúgvarar eisini at fáa.

Heimdesign hoyrir undir P/F Runsival, sum er eitt partafelag hjá Jóa Winther.

Í sambandi við yvirtøkuna av handlinum byrjar útsølan leygardagin 29. juli kl. 9.00.



*Heimdesign í Dr. Jacobsensgøtu 15*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sosialurin
www.sosialurin.fo